# Gull til føroyskar borðtennisspælarar

**22 føroyskir borðtennisspælarar hava um vikuskiftið verið við í Brøndby Cup í Danmark. Tað eydnaðist føroyskum luttakarunum at vinna nøkur gullmerki**

BORÐTENNIS
*Tíðindaskriv*



*Føroyskir borðtennisspælarar í Danmark. Fremst frá vinstru: Sára Hentze, Marin Brattalíð, Birita Mortensen, Heini Mortensen, Rasmus Potts og Patrik Johannesen. Mittast frá vinstru: Joan Thomasen, Sheila Strøm, Rakul Mikkjalsdóttir, Marin Í Dali, Susie Midjord, Svanna Mortensen, Ragnar Egilson, Fróði Jensen, Gilli Sørensen, Hallur Thorsteinsson og Pætur Albinus. Aftast frá vinstru: Høgni Carlsson leiðari, Mariann Mikkjalsdóttir, Reidar Luid, Levi Winther, Hugin Albinus, Sigurð Carlsson og Eyðun Luid*
*Mynd: Mikkjal Bærendsen*

Fyri triðju ferð vóru føroyskir borðtennisspælarar við í Brøndby Cup, sum verður hildin einaferð um árið. Føroysku spælararnir hava vanliga klárað seg væl, og soleiðis var aftur í ár, tí hesaferð vunnu teir 15 heiðursmerki

Tað verður gjørt upp, hvat av liðunum í kappingini klárar seg best, og triðja árið á rað vunnu føroyingarnir. Tey donsku feløguni luttóku við teirra lokalu feløgum, meðan føroysku spælararnir luttóku sum eitt lið.

### Góð avbjóðing

Tey sum vunnu gull fyri Føroyar vóru: Gilli Sørensen og Sheila Strøm vunnu tvær gull og Susie Midjord vann eina gull.

Tey sum vunnu silvur fyri Føroyar vóru: Fróði Jensen, Rakul Mikkjalsdóttir, Susie Midjord og Pætur Albinus.

Tey, sum vunnu bronsu fyri Føroyar, vóru: Hallur Thorsteinsson vann tvær bronsu og Fróði Jensen, Hugin Albinus, Rakul Mikkjalsdóttir, Sheila Strøm og Susie Midjord vunnu eina bronsu.

Endamálið við ferðini til Danmarkar er at geva spælararunum eina góða avbjóðing, sum kann menna teir. Tað er eisini hugaligt hjá teimum at spæla ímóti spælarum, sum teir ikki hava spælt ímóti áður.

**Endaliga støðan í kappingini gjørdist hendan:**

Føroyar: 5 gull, 4 silvur og 8 bronsu, 45 stig
Roskilde 5 gull, 2 silvur og 4 bronsu, 35 stig
Brøndby 3 gull, 1 silvur og 6 bronsu, 24 stig

# FSF hevur lagt skránna fyri landsliðini

**Fótbóltssambandið hevur nú lagt eina skrá fyri síni fýra ungdómslandslið og a-landsliðið**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fótbóltssambandið hevur stórt virksemið við landsliðum, og umframt a-landsliðið, sum er tað mest sjónliga landaliðið, hevur FSF eisini fýra ungdómslandslið.

Hjá dreingjum eru landsliðini U15, U17 og U19. Hjá gentunum er U19.

Nógvar venjingar, venjingardystir og kappingar eru á skránni ígjøgnum eitt ár, og alt hetta skal samskipast við virksemið úti í feløgunum og landskappingarnar hjá FSF.

Tí hevur FSF nú lagt eina heildarætlan fyri øll landsliðini, og í hesi ætlan verður gjørt upp, nær liðini venja, nær tey verða tikin út og nær tey spæla.

### Kappast í NM og EM

A-landsliðið skal spæla fýra landsdystir í heyst. Fyrsti dysturin verður ímóti Georgia 16. august, síðani verður spælt ímóti Skotlandi 2. september, ímóti Litava 7. oktober og ímóti Fraklandi 11. oktober. Harafturat verður møguliga ein venjingardystur tann 28. mai.

U19 landsliðið hjá gentum verður við í EM-kapping í Svøríki í døgunum frá 26. september til 2. oktober. Har verður spælt ímóti Svøríki, Fraklandi og Kazakhstan.

U19 landsliðið hjá dreingjum skal frá 20. til 23. juli spæla tveir dystir ímóti Stord í Noregi, og í døgunum frá 4. til 12. oktoer verður EM-undankapping í Svøríki, har mótstøðuliðini verða Svøríki, Pólland og Ísland.

U17 landsliðið skal til tvær kappingar. Fyrst í august verður NM, og hesaferð verður kappingin hildin í Føroyum. Frá 19. til 24. oktober verður U17 landsliðið við í EM-kapping í Norðurírland, har spælar verður ímóti vertunum, Kypros og Svøríki.

Skráin fyri øll landsliðini hjá FSF kann lesast í fullum líki á heimasíðuni hjá Fótbóltssambandinum – www.football.fo

# Eli vann kapping í duathlon

**Eli Christiansen hevði munin á Gunnari Dahl Olsen í kapping í duathlon um vikuskiftið**

DUATHLON
*Tíðindaskriv*



*Eli Christiansen vann, Gunnar Dahl Olsen var nummar 2 og Andrass Joensen nummar 3*

Um vikuskiftið var Hoyvíkskappingin í duathlon. Kappast var á økinum kring Studentaskúlan, og súkklað var móti Boðanesi, eftir Ringvegnum, og aftur til skúlan. Runnið var eisini á økinum kring skúlan.

Súkklað var 21 kilometrar og runnið 10,5.

Byrjað var sum samlaður startur, og súkklað var 6 ferðir runt. Skjótt var, at Eli Christiansen og Gunnar Dahl Olsen løgdu seg á odda, og nakað aftanfyri teir kom Andrass Joensen. Í aftara endanum vóru tað Kári Simonsen og Evald Rasmussen, ið sum ikki einaferð kappaðust sínamillum.

### Eli rann skjótari

Byrnanarstøðan helt sær til skift var til renning. Eli legði út sum eitt ólógi og slapp eitt sindur framum Gunnar, sum hinvegin royndi at vinna missin innaftur. Men Eli var sterkari á renniteininum hesaferð og vann.

Andrass Súkklaði og rann púra einasmallur. Hann kundu ikki fáa fatur á Gunnari, og Kári og Evald høvdu ongan møguleika at fáa fatur á honum.

Í kappingini millum Kára og Evald, var Kári tann stinnari, og legði seg beinanvegin fram um Evald og økti um munin alla tíðini.

### Til Íslands at kappast

Hetta var triðja kappingin hjá felagnum í ár, og verður næsta kapping 2. apríl. Tað verður ein sprint triathlonkapping t.v.s. at svomið verður 750, súkklað 20 km og runnið 6 km. Svomið verður í Svimjihøllini í Havn. Súkklað verður frá svimjihøllini, til Skansan og niðan aftur. Teinurin verður súkklaður tríggjar ferðir. Runnið verður seks ferðir á økinum hjá Skógrøkt Landsina. Byrjað verður kl. 13.00.

Kappast verður eisini í 1/12 triathlon t.v.s. at tey, ið vilja royna seg fyri fyrstu ferð sleppa á ein styttri tein.

3. juni fer triathlonfelagið til Íslands at kappast. Íslendingar hava boðið felagnum at verða við í kappingini um íslendska meistaraheitið sum gestir.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. Eli Christiansen | 1.05,26 | 0.48,34 | 1.53,48 |
| 2. Gunnar Dahl Olsen | 1.05,26 | 0.48,58 | 1.54,22 |
| 3. Andrass Joensen | 1.08,26 | 0.50,50 | 1.59,16 |
| 4. Kári Simonsen | 1.17,28 | 0.59,57 | 2.17,25 |
| 5. Evald Rasmussen | 1.17,28 | 1.04,18 | 2.21,46 |

## Fýra ungir skrivað undir við HB

P/f Havnar Fótbóltur boðar frá, at HB hevur skrivað undir sáttmála við fýra av ungu evnaríku leikarum í felagnum. Tríggir av teimum hava unglingaaldur. Hetta sendir eitt greitt signal út um leikarapolitkk felagsins, skrivar heimasíðan hjá HB.

Teir fýra eru Ólavur í Ólavsstovu, Johan Ejvind R. Mouritsen, Poul Thomas Dam og Bárður Mittelstein.

## Rundir dagar í fótbóltinum

Leygardagin 25. mars eru tað liðin 60 ár, síðani Obert Eliasen og aðrir settu Ítróttarfelag Fuglafjarðar á stovn. Dagurin verður hildin við steypadysti ímóti B68, meðan sjálv hátíðarhaldið verður seinni í ár.

Nakrar dagar seinni, týsdagin 28. mars, fyllir bóltfelagð B36 70 ár. Í tí sambandi verður skipað fyri móttøku í B36-húsinum leygadagin 25. mars kl. 10 til 13. Eftir móttøkuna byrjar fótbóltskappingini av álvara, tí tá spælir B36 steypadyst ímóti TB.

## Kreppa hjá Inga og teimum

Lagið er av tí ringasta í Premier League felagnum Birmingham, eftir at felagið tapti heili 7-0 ímóti Liverpool í gjárkvøldið. Tað hevur gingið illa hjá Birmingham í hesum kappingarárinum, og liðið stríðist fyri lívinum í botninum. Tað hevur gingið heldur frægari í steypakappingini, men í gjárkvøldið ruku teir út við einum ordans braki.

Venjarin Steve Bruce segði, at hann hevði ikki tapt so stórt, síðani hann var smádrongur, og dagurin var tann ringasti í hansar tíð sum venjari. Eftir stórtapið ímóti Liverpool bíða truplir dystir í Premier League.

## Start roynir spælara

Todi Jónsson fær møguliga ein nýggjan liðfelaga í Start. Í løtuni er Start á venjingarlegu í Marbella í Spania, og í dag kemur ein nýggjur spælari til venjingarleguna. Tað er Bayal Sall úr Senegal, sum skal royndarvenja við felagnum. Ball hevur spælt heima í Senegal, men hann hevur eisini verið til royndarvenjing í Belgia. Hann er 22 ár gamal landsliðsspælari og kann spæla bæði á miðvøllinum og í verjuni.